# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## TJALDRIÐ KEMUR

Leygardagin er Grækarismessa, og tað skal geva okkum vónir um, at ljósari og heitari tíðir eru fyri framman. Í øllum førum kemur tjaldrið nú aftur til landið, og tað verður hildið við grækarismessuhaldum ymsastaðni kring landið.

**GRÆKARISMESSUHALD**
Kring landið
Leygadagin 12/3



## KANN UNITED FÓTA SÆR?

Tveir ósigrar á rað í Premier League eru alt annað enn vanligt hjá stórfelagnum Manchester United, og nú teir aftur skulu spæla, er stórdystur ímóti Arsenal á skránni. Tey bæði fremstu feløgini í Premier League hittast hesaferð í steypakappingini, FA Cup. Vinnarin fer víðari í kappingini, taparin er ferdigur.

**MANCHESTER UNITED-ARSENAL**
FA Cup
Leygardagin 12/3 kl. 17.15




## TÁ STANLEY FANN LIVINGSTONE

Henry Morton Stanley var 29 ára gamal, tá ið hann í 1869 fekk sín lívs møguleika. Amerikanski blaðeigarin James Gordon Bennet gav honum uppgávuna: Finn Livingstone.
Dr. Livingstone, sum var ævintýrari og trúboðari, var horvin í Afrika, og tað eydnaðist Stanley at finna Livingstone, hóast ógvuliga truplar umstøður. Nú á døgum kann einhvør tannáringur finna fólk á internetinum, men Stanley skuldi ígjøgnum landaøki, sum eingin kendi. Stanley skrivaði søguna um sína ferð, og nú fæst hon í danskari týðing.

**HENRY M. STANLEY**
Hvordan Jeg Fandt Livingstone
Rosenkilde



## TÓNLEIKARAR Á VEG

Konsertin í Norðurlandahúsinum er sett saman við blandaðum tónleiki, har ungu, klassisku tónleikaspírarnir sjálvir greiða frá, soleiðis at heildarupplivingin gerst so góð sum gjørligt. Tónleikarar á veg konsertirnar er rættulig lopfjøl hjá klassisku úrmælingunum, ið fyrireika víðari lestur á lærdum tónlistaskúlum kring allan knøttin.

**TÓNLEIKARAR Á VEG – KLASSISKT**
Norðurlandahúsið í Havn
Sunnudagin 13/3 kl. 16.00



## SANGIR ÚR DÝPINUM

Kamarkórið Tarira, undir leiðslu av Sunleif Rasmussen, framførir hetta vikuskifti verk eftir tónaskaldið Arvo Pärt. Arvo Pärt er føddur í 1935 í Estlandi og er ein av mætastu núlivandi tónasmiðunum í heiminum innan sakralan tónleik. Fyri veruliga at vísa margfeldið innan tónleikin hjá Pärt hevur Tarira valt at fáa Gudmund Mortensen, organist, at framføra eitt verk á urgu og hava fylgispæl til annað verk saman við kórinum. Harumframt fara tríggir strúkarar at hava fylgispæl til verkið »De Profundis«, ið eisini er á skránni.

**TARIRA KONSERT**
Vesturkirkjan 11/3 kl. 19.30
Fríðrikskirkjan 12/3 kl. 16.00



## OSCAR-HEIÐURSLØNT HEVND

Danski filmurin Hevndin hevur júst vunnið eina Oscar heiðursløn, og samstundis er filmurin komin á dvd. Hevndin snýr seg um valið millum hevnd og pacifismu, og søgan gongur fyri seg í einum lítlum donskum býi og einari afrikanskari flóttafólkalegu. Anton er lækni og ferðast millum býin og leguna, han hevur svikið konu sína, og nú royna tey at venja seg við eitt lív uttan hvønn annan. Sonur teirra hevur fingið nýggjan vinmann, men vinarlagið teirra millum hóttir idyllin í býnum.

**HEVNDIN**
dvd-filmur